# Nógvur hvalur undir Føroyum

**Vísindafólkini, sum seinasta mánaðan hava talt hval undir Føroyum, siga, at nógvur hvalur er at síggja**

HVALATELJING
*Edvard Joensen*

Tað er nógvur hvalur undir Føroyum í summar. Men ikki ber til at siga, um tað er tí, at nógv er til yvirhøvur, ella grundin er, at tað er so liviligt undir Føroyum nú, at allur stovnurin er endaður her, sigur Rorethe Bloch á Nátturugripasavninum.

Síðan 29. juni hevur West Freezer úr Miðvági verið úti og talt hval undir Føroyum. Við hava verið vísindafólk úr Føroyum, Danmark og Fraklandi, sum hava luttikið í kanningini, sum gjørd verður. Leiðari fyri kanningini er franska Geneviéve Desportes, sum fyrr hevur búð í Føroyum í samband við hvalagransking. Tey komu aftur mikudagin.

Dorethe Bloch á Náttúrugripasavninum sigur frá teljingini, at hon gekk væl.

– Eg var ikki við sjálv, og enn er so stutt fráliðið, at eg havi eingi nágreinilig tøl. Men eg skilji á teimum, at nógvur hvalur var at síggja, sigur Dorethe Bloch.

Norðmenn og íslendingar hava eisini luttikið í hvalateljingini. Men enn hevur ikki verið samband millum partarnar, so endaliga støðan er ikki uppgjørd enn. Tó sigur Dorethe Bloch frá teljarunum umborð á West Freezer, at í føroyskum sjógvi stendur væl til í summar. Bæði við talið og sløgum. Nógvur ymiskur hvalur er at síggja undir Føroyum í summar, siga tey. Eitt nú nevna tey døgling og nevhval. Stórhvalur hevur eisini verið at sæð. Tó er royður ikki við á listanum, so vítt Dorethe Bloch dugir at siga frá.

Um tað er tí, at stovnarnir eru betri fyri enn fyrr, ella tað er tí, at minni er aðrastaðni, vita tey ikki, fyrr enn gjørt er upp bæði í Noreg og Íslandi eisini.

Í fjør vórðu nakrir grindahvalir í eini grind í Sandavági merktir við sendarum. Teimum frættist frá í nakrar dagar, áðrenn teir blivu burtur.

Dorethe Bloch sigur, at nú fleiri grindir hava verið í ár, hava tey sjálvandi spent hugt eftir, um nakar av merktu hvalunum skuldi verið uppií. Men sannlíkið fyri tí er lítið kortini, og enn hava tey ongan funnið.

Hon sigur, at tey aftur í ár ætla at merkja nakrar hvalir. Trupulleikin í løtuni er tó tann, at tey hava ikki fingið sendararnar til Føroya. Men tá teir eru komnir, er klárt at merkja, sigur Dorethe Bloch, sum fegnast um, at so mikið av grind longu hevur verið, at fólk hava fingið undir tonnina.

– Tá verður tað eisini lættari hjá okkum at sleppa at merkja og reka útaftur, sigur hon.



# Veiðan er steðgað



*Gággufiskiskapurin á Oyndarfirði er nú hildin uppat*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Ólógliga gágguveiðan á Oyndarfirði er steðgað. Vinnumálastýrið hevur syrgt fyri, at bátarnir, sum fiskað hava, ikki koma aftur, sigur landsstýrismaðurin**

GÁGGUVEIÐA
*Edvard Joensen*

Ólógliga gágguveiðan á Oyndarfirði, sum Sosialurin skrivaði um hósdagin, er nú steðgað, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum.

Landsdjóralæknin hevur havt samband við teir, sum fiskað hava á Oyndarfirði, og teir eru nú givnir at fiska gággur har, sigur Bjarni Djurholm frá landsdjóralæknanum.

Annars sigur Bjarni Djurholm, at í Vinnumálastýrinum eru tey ikki heilt samd við tí, Árni Joensen, borgarstjóri í Oyndarfirði, segði í samrøðu við Sosialin hósdagin.

Hann segði seg hava fingið at vita frá Vinnumálastýrinum, at har høvdu tey ikki tíð at syrgja fyri sóttreinsan av bátunum, sum lógu í havnini í Oyndarfirði. Hinvegin fekk hann oyðibløð sendandi, sum hann kundi fylla út og skrivað undir, samstundis sum hann sjálvur sóttreinsaði báratnar. Men tað helt hann seg ikki hava skyldu og førleika til.

Bjarni Djurholm sigur, at Vinnumálastýrið ikki hevur sagt, at tey ikki hava tíð at gera sítt arbeiði.

Hann váttar, at eitt ávíst samskifti hevur verið millum Vinnumálastýrið og borgarstjóran í Oyndarfirði. Men borgarstjórin hevur fingið at vita, at tað er sera trongligt við arbeiðsorku í Vinnumálastýrinum. Tað er bara ein djóralækni afturat landsdjóralæknanum, meðan arbeiðsuppgávurnar eru vaksandi. Og tað ger tað sjálvandi trupult at náa runt allastaðni, sigur Bjarni Djurholm.

Men arbeitt verður í løtuni við at leggja tað "operativa virksemið", sum landsstýrismaðurin málber seg, út til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna. Eisini verður í næstum lýst eftir einum djóralækna afturat, sigur Bjarni Djurholm. Tá skuldi støðan gjøstt munandi betri á veterinera økinum, væntar hann.

Løgmaður:

# Røðan verður liðug sunnudagin

**Ólavsøkurøðan, sum løgmaður skal halda í løgtinginum ólavsøkudag, er enn ikki heilt liðug. Løgmaður ætlar sær ikki at seta punktum fyrr enn á middegi sunnudagin**

ÓLAVSØKURØÐAN
*John Johannessen*



*Løgmaður ætlar sær ikki at seta seinasta punktumið í løgmansrøðuni fyrr enn í seinastu løtu, áðrenn hon skal haldast*

Seinasta punktumið í ólavsøkurøðu løgmans fyri í ár verður ikki sett fyrr enn sunnudagin.

Løgmaður er júst afturkomin í Tinganes eftir ein lítlan summarsteðg á Viðareiði. Tí hevur hann ikki havt so nógva tíð at gjøgnumganga tilfarið til røðuna frá ymisku aðalstýrunum.

– Eg fari nú at seta meg við røðuni, og eg rokni ikki við, at hon verður heilt liðug fyrr enn á middegi sunnudagin, segði Anfinn Kallsberg, løgmaður, tá Sosialurin tosaði við hann hósdagin.

## Tríggir partar

Ólavsøkurøða løgmans í ár verður eins og undanfarin ár í trimum pørtum. Fyrsti parturin er tann, sum løgmaður lesir upp frá tingsins røðarapalli, tá tingið verður sett ólavsøkudag. Í øðrum parti verður gjølligari greitt frá ymisku málunum í løgmansrøðuni. At enda er triðji parturin av røðuni ein løglisti.

Í stýrisskipanarlógini er ásett, at løgmaður á ólavsøkufundinum skal greiða frá støðu landsins og tí, ið landsstýrið hevur í ætlan at fremja. Síðani skal løgtinið innan seks yrkadagar taka støðu landsins til umrøðu við støði í røðu løgmans.



# Havnaøkið skal haldast við líka

**Klaksvíkar kommuna søkir nú eftir handverkara, sum skal gera viðlíkahaldsarbeiðið á havnaøkinum**

HAVNAØKI
*Eyðun Klakstein*

Tørvurin á viðlíkahaldsarbeiði á havnaøkinum er so stórt, at Klaksvíkar kommuna nú søkir eftir einum handverkara til at røkja havnaøkið.

Formaðurin í havnanevndini hjá Klaksvíkar kommunu, Torleif Sigurðsson, hevur víst á, at neyðugt er við umvælingum og viðlíkahaldið á havnaøkinum, og tað kommunan tí skal seta eitt fólk at taka sær av hesum arbeiði.

Í bløðunum í gjár verður so søkt eftir hesum handverkara, og í starvslýsingini verður sagt, at hann skal røkja bygningar, bátabrúgvar, bryggjurnar og annað.

Havnaøkið í Klaksvík er sambært formanninum í havnanevndini í ringum standi, og tí verður helst eisini okkurt umvælingararbeiðið at taka sær.



*Ein handverkari skal nú setast burtur av at røkja havnaøkið í Klaksvík*



*Sundaberg hevur gjørt roktúr seinasta tríggjar mánaðirnar*

# Stórir manningarpartar

**Sundaberg hevur gjørt roktúr eystanfyri, og manningapartarnir fyri tríggjar mánaðir nærkast 300.000 krónum**

FISKISKAPUR
*Eyðun Klakstein*

Flakatrolarin hjá JFK, Sundaberg, hevur gjørt ein rimmar túr eystanfyri.

Lokalblaðið, Norðlýsið, skrivar í gjár, at Sundaberg fekk 830 tons teir tríggjar mánaðirnar, hann hevur verið til fiskiskap.

Sundaberg var í Klaksvík týsdagin, men hann legði beinanvegin leiðina til Grimsby, har veiðan skal leggjast upp. Prísurin á flaki er góður í løtuni, og tí kann lastin seljast fyri útivið 30 milliónir, skrivar Norðlýsið.

Um hetta verður inntøkan, kunnu teir umborð roknað við einum manningaparti, sum fer at tátta í tær 300.000 krónurnar.

